# Lívskvæði seyðabóndans

Líta  vit á ársins gátt
á bóndans verk í vavi,
síggja vit so skjótt og brátt
at verk hans alt er strævið.

*Vit bóndanum lov her tí kvøða,*
*vit verk hans í vísu umrøða,*
*bóndin vann á árinum,*
*vit bóndanum lov her tí kvøða.*

2. Bóndans ár á vali er
ein mikil lívsins meldur,
har árið honum roynslur ber
nógv fleiri enn tú heldur.

3. Árið rennur, vetur fer,
veðrur heim man stunda
á sín bás, har hoyggið er,
nú liðugt er at brunda.

4. Bóndin hyggur til sín seyð,
ber á baki fóður,
ikki má hann líða neyð,
skal skurður gerast góður.

5. Vetur bráðnar burt um bak,
lembingin í hendi,
ær er feit, og ær er rak,
sum henni royndist lendið.

6. Kyndilsmessa farin er, (2/2)
marsurin hann lúnar,
ærin gras til føðslu ger,
seg til lembing búnar.

7. Bóndin tolin er á tá,
ansar sínum fylgjum,
reikar runt um heyg og lág
á sínum vónarbylgjum.

8. Gævið satt at lukkan lær,
lambsburður gerst vænur,
minst eitt lamb frá hvørji ær
og ongin lambasprænur.

9. Soleiðis vár bóndi gár
sveimandi á vali,
droymir um eitt vælavár
við stórum lambatali.

10. Ymist er frá ár til ár,
sum lagnan lembing lagar,
vár er ikki altíð vár,
sum ymsir roynast dagar.

11. Gamalt er at avlembt var,
tá fult er tjaldursreiður,
tá Krossmessa til bónda lær (3/5)
tí nú er himin heiður.

12. Lembt man vera mestsum av,
tá prílurin er farin,
bóndin birgur við sín stav
aktar seyð um garðin.

13. Ær og lamb til fjals hann fær
gjøgnum garðalið
niðan líð um fjallaskarð
at jótra gras í frið.

14. Ær skjótt finnur á sítt stað,
har grasið best man næla,
har vit síggja lomb so glað
um heið og túgvu spæla.

15. Bóndin nú í bøin fer
at sáa og at velta,
ymsa grøði bøur ber,
sum lukkan hann mann elta.

16. Eplir roknar hann í fold,
bø í sátulendir,
fruktin er, sum góð er mold,
og sól Várharra sendir.

17. Jóansøkan boð oss ber, (24/6)
várfjall er í vænti,
leys á ónum ull nú er,
um væl eitt ár hon tænti.

18. Fyrr var ullin bóndans gull,
nú tey hana vraka,
tí hvør goymsla liggur full,
tí ongin ull vil taka.

19. Fyrr var ullin nappað væl,
síðan varð hon karða,
til á strá eitt villatal
rúgvaðist til varða.

20. Nú vant bóndin strong um gjør,
so rennil fekst at mala,
so at tortil uttan slør,
fekk spunalag at spæla.

21. Villan tekur so í hond,
favnar langt og gevur,
melur hjól um nokkarond,
og garn um snældu vevur.

22. Kanska ull enn einaferð,
bóndans gull bleiv aftur,
so hon prýddi hansar verð,
rætt sum dýrur skattur.

23. Bóndin líggjan ber á stein,
onkur fæst at vinda,
eggin verður hvøss og rein,
nú ráin má sær lynda.

24. Slær nú bóndin teig og fløtt
við sín hvassa líggja,
gleðir seg um vælaslótt,
sum vakur er at síggja.

25. Rista, klúka, raka vøll,
hoykonur við møði,
vælkylt standa prúð nú øll
sátubørn á bøi.

26. Hoyterrin ei altíð er
vinur við sín bónda,
mangan skálkabros hann ger,
sum bert er av tí ónda.

27. Argar bóndan dag um dag,
æl við ælasliti,
til hann svør í ringum lag:
“Skjótt eg missi viti.”

28. Sól at kalla ikki sá,
mjørkakógv var verri,
yvir hvørjum teigi lá,
tám og ongin terri.

29. Bóndin beiskur illur gár
maktarleysur hóttir,
hvussu verður ær í vár,
tá rotin liggur flóttur.

30. Turt av hógvi neyvan fæst,
vátur bóndin sannar,
skal eg fáa hoynum bæst,
má terrin vera annar.

31. Ganga kann eg ei sum býtt,
meðan vætan rotar,
keypi tól av neyð mær nýtt,
sum gras í plastdúk potar.

32. Beri síðan ballið inn,
besta seyðafóður,
hyldnast millum merg og skinn,
møðrar feitir góðir.

33. Bóndans ár mót heysti ber
eftir slavið summar,
oman líð fer á við ferð,
grimdarregnið trummar.

34. Mikkjalsmessa, skurðfjallstíð, (29/9)
sólin er á tambi,
gingin verða fjøll og líð
eftir veðurlambi.

35. Skurðsól ella dilkasól,
vórðu havd á tungu,
bestan mør í skurði ól
hjá veðurlambi ungum.

36. Menn á rætt so spentir nú
ganga runt og skyma,
kanna veðurlomb øll prúð,
um tey munnu gima.

37. Brundevnið við veljast má
eftir slag og dygdum,
handlað væl í bul og brá
eftir bestu brigdum.

38. Knýta teir á hupp ein lagd
á veðurlambi valda,
so tað fær eitt eyka bragd
frá tí til tøku talda.

39. November ‘máni’ komin er,
Mánað’sól á tambi,
maður hvør í klipping fer,
eftir gimburlambi.

40. Nú tá klipping liðug var,
seyðaár er runnið,
tikin verður avdeyð ær
og gimburlamb hvørt funnið.

41. Uppslept tú her nøkur sær
klipt um pannuvikin
fyri hvørja gamla ær,
sum tannleys verður tikin.

42. Svava, tumma, fletta nú
menn í hvørjum kliva,
reypa hátt um lomb so prúð,
og heystlomb smá sum liva.

43. Práta hátt um krov so prúð,
at bismari sæst riða
á vekt, tú ikki hevði trúð,
at nakað krov kann viga.

44. Reypa við um tálg og mør,
um sperlar og um lundir,
sum ikki gerast minni sør,
tá drukkið verður undir.

45. Ja, summar fór, og heystið kom,
hvítna fjallatindar,
lýkkan lak um heystsins trom,
kaldir blæsa vindar.

46. Gævi satt at kjøtheyst bleiv
gott á bóndans ási,
flugan hvarv úr køst og kleiv
inn til kúgv á bási.

47. Bóndin slítir hjalsins gátt,
passar sínar ásar,
gævi kjøtið stadnar brátt,
ræsist so tað krásar.

48. Tryggur bóndin ei kann gá,
bangin runt hann bivar,
til hann válgara sker frá,
og krovið liðugt skivar.

49. Finnur maður maðkabráð,
har kjøt er burtur bráðna,
tá er synd at vera hjá
og síggja bóndan hjána

50. Ólukkan, hon slái teg,
skinnflugu á fjalli,
sum við maðki ger fortreð
á ás í mínum hjalli.

51. Limast má hvørt krovið nú
sundur smátt í pettir,
hyggjast má í hvørja súð,
til einki víggj er eftir.

52. Limar hann nú krovið upp
úr hálsi í hárógvu,
hárygg, mjórygg, síðu, hupp,
úr tjógvi fram í bógvin

53. Var nú ongin makkur í,
kjøt á tungu liggur,
gloymir hann alt strev og stríð,
tí nú er ásur tryggur.

54. Síðan góð til høgtíð er,
lambsbógvurin líka,
háryggur nú súpan ger
ræstkjøtsveitslu ríka.

55. Kjógvið gott úr ovni er
mitt á veitsluborði,
tó sum turt tað best seg ber
í tunnar álir skorið.

56. So fann krov í hjall sær stað,
flugutætt for rivur,
bóndans fólk nú eru glað,
lívsins sirkul liðugur.

57. Bóndin kann nú halda jól,
nú flugufriður veldur,
hvíla seg í vetrarsól
til nýggjan ársins meldur.

Petur Martin Petersen, Fuglafirði, yrkti í september 2010 til eina til eina kvøldsetu í november sama ár í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.